Jóannes Eidesgaard, løgmaður, eygleiðir málningin av fyrrverandi løgmanni Atla Dam, sum nú hongur í Tinganesi

Mynd: Álvur Haraldsen

Eitt andlit er ein labyrint

Hóast illa darvaður av sjúku, málar 78 ára gamli lisamaðurin Eyvindur Mohr framvegis. Hann hevur júst lagt úr hondum mynd av fyrrverandi løgmanni Atla P. Dam, sum skal á veggin í løgmansskrivstovuni

LIST
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo
Myndir: Álvur Haraldsen

Eyvindur Mohr, listarmaður, hevur málað løgmenn áður og hevur júst lagt úr hondum málning av Atla P. Dam. Málningurin skal hanga í løgmansskrivstovuni, har málningar av øðrum løgmonnum eisini hanga.

Hóast Eyvindur eftir álvarsliga sjúkralegu fyri tað mesta situr í rullustóli, so darvar hetta honum ikki.

Heldur var tað hinvegin so, at arbeiðið við málninginum var ein orsøk til, at hann kom fyri seg aftur, tí tempramemt og vilja hevur Eyvindur altíð havt. At arbeiðið við málninginum bíðaði gjørdi sítt til, at hann kom seg aftur, og læknans orð vóru eisini, at hesir eginleikar Eyvinds vóru við til at lekja.

Kennir persónin

– Andlitið er ein labyrint, sigur Eyvindur.

Eyvindur leggur serligan dent á eyguni og andlitsskuggar – næsaskuggin er t.d. sera avgerandi – tá hann málar andlitsmyndir. Best er um hann kennir persónin, so hann veit hvat leggjast skal í eyguni.

– Eg kenni Atla sera væl, so tað fall lætt at mála. Hann er málaður, tá hann er mest seriøsur, men tó sæst tað menniskjasliga, tí Atli var ikki hin fatti statsmaðurin. Tað sæst eisini á hondini, har er nakað menniskjasligt, ið sigur frá, at maðurin er ikki vandamikil, sigur Eyvindur Mohr.

At hann nú fyri tað mesta málar sitandi í rullustóli, metir Eyvindur ikki sum nakran stóran trupulleika.

Ein andlitsmynd er ikki nakað ein berjist við, men kanska nakað eina meira situr og pilkar við. Eg klári at standa, so um talan er um størri motiv, so ber tað eisini til, sigur Eyvindur.

Litríki listamaðurin er kendur sum ein, ið ikki leggur fingrarnar ímillum. Við einum skeivum smíli leggur hann afturat frágreiðingini um málningin av Atla P. Dam, at tað altíð er so við listini, at nú byrjar tað mest umráðandi, nevniliga at finna útav hvat hetta nú er fyri nakað, hvussu tað eitur.

– Tað er ofta tað mest umráðandi, hugleiðir Eyvindur, og nevnir listamannin, sum eftir okkurt minni gott avrik kallar hetta "roynd 1" og "roynd 2" og so framvegis ella kanska "kompositión".

Eyvindur hevur, hóast aldur og sjúku, ikki lagt penslarnar inn, men strýkur framvegis frameftir eftir nýggjum avbjóðingum ið, sum skilst, eru við til at halda lív í honum, bæði gerandisliga og listarliga, tí nógvar avbjóðingar av ymsum slag bíða Eyvindi.

Málningurin av Atla Dam, sum Eyvindur Mohr, listarmaður hevur málað

Mynd: Álvur Haraldsen



Eyvindur hevur, hóast aldur og sjúku, ikki lagt penslarnar inn, men strýkur framvegis frameftir eftir nýggjum avbjóðingum

Mynd: Álvur Haraldsen

Nú kemur Popplist 3

Arbeitt verður nú við at fáa triðju Popplist fløguna á marknaðin og hósdagin 28. oktober verður útgávudagur. Tá ber til at ogna sær hetta savn av gomlum perlum og av løgum, ið hava merkt farna tónleikaárið

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Fyri trimum árum síðani varð farið undir eina fløgusavnsrøð við heitinum Popplist. Nú kemur tann triðja í røðini.

Talan er um savn, ið á mangan hátt umboðar tað besta, ið komið er av føroyskum tónleiki, siga fyrireikararnir. Talan er bæði um tónleik, sum frammi hevur verið í útgávuárinum, og um gamlar perlur, sum ikki farast av tíðarinnar tonn.

Fløgan hesaferð er einki undantak. Á fløguni eru Teitur, Kristel, Johan í Kollafirði, Lena, Petsi Tvørfoss, Gunnar, Høgni Lisberg, Eivør, I Am, Devided Minds, Enekk, Kristleif Zachariasen, Annika Hoydal, Headache Blues trio, Blátt, Joka, Lokum, Charles Gade og Pætur við Keldu.

Tutl og 3'arin skipa fyri og fløgan kemur út hósdagin 28. oktober.



28. oktober kemur triðja fløgan í savnsrøðini Popplist á føroyska marknaðin. Fløgan umboðar á mangan hátt tað besta, ið er útkomið av føroyskum tónleiki